## HEILSANIR

Bert ein heilsan til okkara elskaða Homies, Bjartur Fríða Clementsen í Havn. Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 5. sept. Nær kemur tú til Gøtir at fanga æðir. Alt tað besta, love you! Eisini ein heilsan til hinar.
**Heilsan øøhhh...... You know**

**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku við degnum sum var tann 7. sept.
**Heilsan Annika og Sørin**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Hendan steikin báðumegin »Ray Sawyer« rundar tey 40 árini 9. sept. Tillukku tillukku
**Frá ?**

**Hola chica**
Hendan fantastiska lekra, pena og fitta diddan er blivin 18 ár í dag. Hjartaliga tillukku góða.
**Ynskja tveir 03e'arar og ein 03z'ari**

Tillukku við 18 ára degnum baby. Hetta sær út til at vera eitt gott ball, men tað verður genialt í kvøld. Vit elska teg
**The 3 tigers**

**Góða Bára**
Hjartaliga tillukku við degnum. Nú ert tú ikki bara lekkur, men 18 og HOT. Og til hina didduna, nú mást tú hava tað so gott í N.Z. Vit fara at sakna teg. Lov you.
**Ynskja Piff, Paff, Puff**

**Allarbesti abbi**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri meg. Eg elski teg.
**Kærar heilsanir Tróndur**

Hjartaliga tillukku við degnum tann 9 sept. Nú ert tú ein super hot 17 ára chick. Elski teg.
**Ynskir Gunn**

**Góða allarbesta omma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum.
**Ynskir Fríálvur**



**Góða allarbesta omma**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum.
**Heilsan Birita, Annika og Sørin**

**Góði Hans**
Hjartaliga tillukku. Hasin var flottur og koyrdi skjótt.
**Frá okkum sum fegin vildu síggja hann koyra**

**Góði fitti lítlibeiggi**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum.
**Ynskir stóribeiggi, Høgni**

Hugsa tær. Eina ferð við Norrønu, har tú og makin kunnu njóta ekslusivu atmosferuna í suituni á glæsiliga ferðamannaskipi føroyinga. »Jú, men tað kostar« vilja summi helst halda, men tað nýtist nú ikki at kosta so nógv.

Saman við Smyril Line og Føroya Sparikassa gevur Sosialurin nevniliga tær møguleikan at fara á dreymaferðina. Ferðast sjálvur annar á eini av rutunum hjá Smyril Line við øllum tí marglæti, sum stóra ★★★ ferðamannaskipið gevur tær.

Og tað er ikki nóg mikið við tí. Umborð á Norrønu hevur tú eisini sersømdir, tí Føroya Sparikassi gevur tær eina konto umborð, har tú kanst nýta upp til 10.000 kr. á ferðini. So skuldu ráðini verið til bæði eitt og annað.

Umframt høvuðsvinningin, verður eisini ein eykavinningur drigin. Hesin er ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili til Danland í Blokkhus í eina viku.

Og tað er sera einfalt at vera við í kappingini. Sjey leygardagar á rað verður spurnarblað í Sosialinum, har tríggir spurningar skulu svarast. Fyrsta spurnarblaðið er í blaðnum í dag, og seinasta verður so í blaðnum 23. oktober. Tá øll spurnarbløðini eru svarað, skulu hesi sendast okkum í einum brævbjálva. Brævbjálvin skal merkjast »dreymaferð« og skal sendast til:

**Sosialurin**
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Bert seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum kunnu vera við í kappingini. Loyvt er ikki at senda avrit av seðlum.

Saman við svarlepanum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummari hjá tær. Svarleparnir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. oktober, og leygardagin, 30. oktober verður so almannakunngjørt, hvørji eru hepnu vinnararnir.

ÚT AT FERÐAST

Sosialurin

### DREYMAFERÐIN 1. UMFAR

Evnið hesaferð er Smyril Line og Norröna. Vit skulu hava svar upp á tríggjar spurningar. Nevniliga:

1 Hvat ár byrjaði Smyril Line uttanlandssigling sína

2 Hvussu æt gamla Norröna, áðrenn hon varð keypt til Føroya

3 Á hvørjari skipasmiðju í Týsklandi varð nýggja Norröna bygd